# Svendborg fekk stig móti oddaliðnum

Uppflyting er ikki longur stóra samtaluevnið í Svendborg. Liðið, við Julian Johnsson sum liðskipara, hevur vunnið sær fá stig seinastu vikurnar. Men í gjár legðist eitt av slagnum afturat hinum. Svendborg spældi í dag javnleik á útivølli móti oddaliðnum í 2. division vest, FC Fyn. Úrslitið gjørdist 1-1. Svendborg er í løtuni seks stig frá uppflyting. Sjey dystir resta í av kappingarárinum.



# Kerr sá Frem tapa

Brian Kerr var millum áskoðararnar í Herfølge, tá Frem við Jón Róa Jacobsen á liðnum vitjaði sunnudagin. Men tað var nú ikki tann besti dysturin hjá Frem, sum føroyski landsliðsvenjarin hevði valt sær. Lasse Kronborg skeyt tvey mál, triðja málið skeyt Roberto Saraiva. Herfølge er nú á odda í næstbestu fótbóltsdeildini við 52 stigum. Frem er nummar 10 við 28 stigum. Tapið í dag, var tað fyrsta hjá Frem, síðani kappingin byrjaði aftur, aftaná vetrarsteðgin.

## Sera skuffaður

– Eg eri sera skuffaður, at vit missa sigurin so seint í dystinum. Men teir pressaðu væl, samstundis sum vit høvdu hug at leggja okkum longur aftur, tá vit vóru komnir framum, sigur Johan Petur á Stongum, sum við einum drøni av einum langskoti legði 07 Vestur á odda 2-1.

Hann ásannar, at líkindini at spæla ikki vóru tey bestu í vindinum:

– At so nógvur vindur var, var sjálvandi keðiligt fyri spælið, og tað vísti seg eisini, at tað liðið, sum hevði vindin undan, fekk flestar kjansir. Í fyrra hálvleiki, tá vit høvdu mótvind, royndu vit bara at dekka upp, og tíbetur stóð Trygvi væl í málinum, tá harðast leikaði á.

Johan Petur sigur, at ætlanin hjá teimum í 07 Vestur var at fáa trý stig, men at tað eina stigið helst er nakað, hann kann liva við, hóast súrt er at missa sigurin á stokkinum.

**hil**

## Ikki ónøgdur

Nikolaj Eriksen, sum tveir minuttir fyri tíð tryggjaði AB javnleikin, var sum vera man fegin, tá dysturin ímóti 07 Vestur var av, tí í ein hálvan tíma sá AB út til at vera á veg ímóti einum tapi.

– Vit høvdu sjálvandi ynskt at fingið trý stig, og so hevði tað eisini sæð ordiliga gott út hjá okkum. Men sum tað gekk í seinna hálvleiki, kunnu vit ikki vera ónøgdir við eitt stig, sigur danski framherjin.

– Nú var sjálvandi nógvur vindur, sum gjørdi tað torført at fáa spælið at koyra, men vit áttu at verið so mikið vanir við vindin, at vit skuldu spælt betur, enn vit gjørdu í fyrra hálvleiki. Tá vit í seinna fingu bóltin niður á jørðina, gekk eisini nógv betur, staðfestir Nikolaj Eriksen.

**hil**



*Veðurlíkindi spældu ikki við liðunum á Argjum, men eftir førimuni royndu liðini at fáa glið á spælið í til tíðir undirhaldandi dystinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

AB-07 Vestur 2-2 (0-0):

# Eingin vinnari í vindinum

**Argjamenn mundu vera best nøgdir við at fáa stig, tá 07 Vestur var á vitjan í gjár, tí vágamenn vóru á odda til bara tveir minuttir vóru eftir. Men tað hevði týdning fyri báðar partar at fáa stig í dystinum, sum var nógv ávirkaður av vindinum inni í Vika**

FÓTBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

AB

07 Vestur

Longu undan dystinum var greitt, at møguleikin var størri fyri flúgvandi enn flótandi fótbóltsspæli, tí so mikið av vindi var oman úr Havnardali, at skjótt kundi vera at missa bóltin, var ikki spælt við skili og uttan at senda bóltin ov nógv upp í loft.

Fyri steðgin var 07 Vestur heilt klárt klókara liðið, tí vágamenn hildu bóltin niðri á jørðini, meðan teir í AB høvdu í so góðan hug at gyppa og senda bóltin upp í loft. Men hóast 07 Vestur dugdi betur at spæla, var tað AB, sum fekk teir størstu møguleikarnar í fyrra hálvleiki.

Danski framherjin, Nikolaj Eriksen, hevði fyrst tveir skallarar, og síðani høvdu bæði Rasmus Nielsen og Jónas Stenberg góðar skotroyndir, harav onnur noyddi Trygva Askham í 07 Vesturmálinum út í fulla longd. Í hinum endanum var meira smáligt, hóast 07 Vestur brúkti skil og royndi at spæla, og tað einasta var eitt millum ting millum skot og innleg frá Milan Pejcic, sum AB-málverjin, Heðin Stenberg, ikki fekk trupulleikar av.

### Lívligt korter

Líkindini vóru tey somu eftir steðgin, tá tað vísti seg, at AB fekk betur skil á spælið, nú vindurin var ímóti, samstundis sum 07 Vestur ikki í eins stóran mun fall í grøvina, at senda langar og høgar bóltar avstað í vindinum, so eingin kundi fáa fatur í teimum.

Mest lívliga løtan var fyrsta korterið, tá eisini trý av teimum fýra málunum í dystinum komu. AB var fyrra liðið at fáa hol á, og tað var tann lívligi Kenneth Jacobsen, ið reikaði nógv um allan vøllin í gjár, sum var á rætta staðnum, tá fimm minuttir vóru farnir, og so var 1-0 til AB.

Men argjamenn fingu nóg illa armarnar niður, áðrenn 07 Vestur svaraði aftur ein góðan minutt seinni. Tór Ingar Akselsen fekk bóltin nakað úti í høgru síðu og skjeyt so væl, at bólturin umvegis aftaru stong fleyg í málið, uttan at Heðin Stenberg fekk gjørt nakað við tað.

Og hóast AB royndi at manna seg uppaftur, fekk 07 Vestur eisini lagt seg á odda, tá eitt korter var farið. Jens Erik Rasmussen sá í fyrsta umfari út til at taka ferðina av einum skjótálopi, men vísti seg tó at hava eina ætlan, tí hann legði bóltin væl fyri føturnar á Johan Peturi á Stongum, sum kom rennandi frameftir og mitt fyri smekkaði til frá brotsteigarmarkinum, so gestirnir nú vóru á odda 2-1.

### Í evstu løtu

Hóast AB spældi nógv skilabetri ímóti vindinum í seinna hálvleiki og væl megnaði at koma fram á vøllin, hevði 07 Vestur undan vindinum í øllum førum tveir góðar møguleikar at gera dystin lidnan og fáa lagt sjógv ímillum seg og AB. Bæði Jens Erik og serliga Hendrik Rubeksen brendu góðar møguleikar.

Tíðin gekk undan hjá AB, sum royndi at styrkja um álopsspælið við einari útskifting fyri og aðrari eftir, og tveir minuttir fyri tíð gav tað eisini úrslit. Kenneth Jacobsen sendi bóltin innfyri úr høgru síðu, og fyrst royndi innskifti Liam Killa seg við skoti, sum tó ikki bar á mál. Verjan hjá 07 Vestur fekk tó ikki ruddað burtur, og bráðliga stóð Nikolaj Eriksen leysur og kundi skjóta forloysandi málið fyri AB til 2-2.

At dysturin sostatt endaði við javnleiki, mundi samanlagt vera á einari leið, tí hóast 07 Vestur sæð yvir allan dystin var skilabetra liðið, so menti AB seg so hvørt og legði at enda nokk so stórt trýst á. Hinvegin kundi 07 Vestur farið avstað við trimum stigum, var neyvleikin har, tá brúk var fyri tí mitt í seinna hálvleiki.